Nr. 45 6. apríl 2022

# Kunngerð um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum

Við heimild í § 25, stk. 4, § 34, stk. 1, nr. 1 og § 64, stk. 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020 og løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021, verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Kunngerðin er galdandi fyri fiskiskap í føroyskum sjógvi og ásetir reglur um veiðibann á gýtingarleiðum.

*Gýtingarleiðir, friðaðar fyri ymiskum reiðskapi*

**§ 2.** Loyvt er ikki at veiða á leiðum við reiðskapi í tíðarskeiði, sum niðanfyri tilskilað:

1) Í tíðarskeiðinum frá 15. februar til 31. mars, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða við nøkrum veiðihátti, veiða við snellu og garnaveiða eftir havtasku tó undantikin, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
   a) 61°40,000 N - 008°25,000 V
   b) 61°54,000 N - 008°40,000 V
   c) 61°54,000 N - 007°25,500 V
   d) 61°58,000 N - 007°15,000 V
   e) 61°53,000 N - 007°04,000 V
   f) 61°45,000 N - 007°04,000 V
   g) 61°40,000 N - 007°16,000 V
   h) 61°40,000 N - 008°25,000 V
2) Í tíðarskeiðinum frá 15. februar til 15. apríl, báðir dagar íroknaðir, er fiskiførum størri enn 80 tons, fiskifør uttan egningarmaskinu tó undantikin, ikki loyvt at veiða við línu millum 315° rættvísandi úr Barðinum, 62°08,800 N - 007°26,000 V, og 360° rættvísandi úr Mýlingi, 62°18,180 N - 007°12,500 V, og millum 6 fjórðingar og 12 fjórðingar úr grundlinjunum.
3) Í tíðarskeiðinum frá 1. februar til 1. apríl, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða við nøkrum veiðihátti, veiða við snellu og garnaveiða eftir havtasku tó undantikin, millum 315° rættvísandi úr Barðinum, 62°08,800 N - 007°26,000 V, og 360° rættvísandi úr Mýlingi, 62°18,180 N - 007°12,500 V, frá 12 fjórðingum úr grundlinjunum og út á linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
   a) 62°32,000 N - 008°15,000 V
   b) 62°46,000 N - 007°12,500 V
4) Í tíðarskeiðinum frá 15. januar til 15. mai, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða við troli millum 360° rættvísandi úr Mýlingi, 62°18,180 N - 007°12,500 V, og 360° rættvísandi úr Ennibergi, 62°23,816 N - 006°33,633 V, frá 12 fjórðingum úr grundlinjunum og út á linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
   a) 62°46,000 N - 007°12,300 V
   b) 62°48,000 N - 007°00,000 V
   c) 62°50,000 N - 006°33,633 V
5) Í tíðarskeiðinum frá 15. februar til 15. apríl, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða við nøkrum veiðihátti, veiða við snellu, snøri og tráðu tó undantikin, millum 360° rættvísandi úr Mýlingi, 62°18,180 N - 07°12,500 V, og 360° rættvísandi úr Kallinum, 62°22,250 N - 006°48,333 V, og millum 6 fjórðingar og 12 fjórðingar úr grundlinjunum.
6) Í tíðarskeiðinum frá 15. februar til 15. apríl, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða við nøkrum veiðihátti millum 360° rættvísandi úr Ennibergi, 62°23,816 N - 006°33,633 V, og longdarstigið 006°15,000 V millum 12 fjórðingar og 16 fjórðingar úr grundlinjunum, og millum 360° rættvísandi úr Ennibergi, 62°23,816 N - 006°33,633 V, og longdarstigið 006°00,000 V millum 16 fjórðingar úr grundlinjunum og út á eina linju drigin millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
   a) 62°45,000 N - 006°33,633 V
   b) 62°37,000 N - 006°00,000 V
7) Í tíðarskeiðinum frá 15. januar til 1. apríl, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða við nøkrum veiðihátti, línuveiða

og snelluveiða undantikin, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

a) 62°20,000 N - 005°45,000 V
b) 62°20,000 N - 005°25,000 V
c) 62°15,000 N - 005°25,000 V
d) 62°09,000 N - 005°40,000 V
e) 62°09,000 N - 005°50,000 V
f) 62°20,000 N - 005°45,000 V

8) Í tíðarskeiðinum frá 1. mars til 1. mai, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða við nøkrum veiðihátti á Føroyabanka innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

a) 60°57,333 N - 007°57,000 V
b) 61°03,000 N - 007°57,000 V
c) 61°15,500 N - 008°16,000 V
d) 61°13,333 N - 008°42,200 V
e) 61°00,000 N - 009°11,000 V
f) 60°48,666 N - 009°25,000 V
g) 60°26,000 N - 009°08,416 V
h) 60°36,500 N - 008°45,000 V
i) 60°45,666 N - 008°37,000 V
j) 60°57,333 N - 007°57,000 V

*Revsing o.a.*

**§ 3.** Brot á § 2 verða revsað við sekt, er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóg.

*Stk. 2.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

*Stk. 3.* Sambært § 70 í løgtingslógini kann Vørn beinanvegin taka aftur rættin til at reka vinnuligan fiskiskap, um brot er framt sambært stk. 1. Rætturin at reka vinnuligan fiskiskap kann takast aftur upp til 4 vikur hvørja ferð.

*Gildiskoma og úrgildisseting*

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 23 frá 16. mars 2005 um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum fyri skip úr Noregi og ES-londum og kunngerð nr. 4 frá 9. februar 2006 um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum.

Fiskimálaráðið, 6. apríl 2022

**Árni Skaale (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)